# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Ragnhild Gaardbo 80 ár



Týsdagin 3. oktober fyllir mamma okkara, Ragnhild Gaardbo á Toftum 80 ár.

Mamma er dóttir Rachel og Jóhannus Hansen í Túni á Toftum og vaks upp í einum góðum heimi í rekkjuni mitt á Toftum, saman við systkjum sínum, Yddi, Hilda, Anna, Hanni, Lela, Ingebeth, Hannebeth, Eli og Astrid.

Sum ung fór hon út at tæna, bæði her á Toftum, og eina tíð inni á Glyvrum, eisini tænti hon, saman við Lelu, eina tí úti á Barnaheiminum á Nesi.

Eftir at mamma og pápi vóru gift undir kríggnum, var mamma heima og passaði okkum, svigarforeldrini, húsini og familjuna.

Tá vit so vóru blivin vaksin og flakavirkið var komið á Toftum, fór mamma at arbeiða á Nyki, og arbeiðssom sum hon var og við sínum lætta sinni, treivst hon sera væl millum arbeiðsfólki á flakavirkinum, har hon hevði ymisk álitisstárv.

Fyri okkum hevur hon altíð verið tann fullkomna mamma, sum uppaldi okkum í kærleika, umsorgan, góðsku og hjálpsemi, bæði í uppvákstrinum og eisini síðani vit blivu vaksin, og sama lyndi hevur hon síðani víst móti børnum og familjum okkara.

Mamma saman við pápa, ið doyði í 1981 bert 57 ára gamal, skaptu í hjúnalagi teirra, tær bestu og tryggastu umstøður hjá okkum børnum at vaksa upp í sum hugsast kundi.

Vit kundu ikki fingið ein betri og tryggari uppvákstur, enn okkara trygga og góða barnaheim uppi í Brekkum, har mamma í okkara yngru árum gekk heima, og pápi arbeiddi sum arbeiðsformaður hjá D. P. Højgaard niðri í Oyrunum.

Meðan vit vóru børn, var mamma jú altíð heima, so vit komu ongantíð heim til tóm hús, men sum oftast vóru nógv fólk inni umframt mammu.

Hetta komst óiva av, at mamma altíð hevur havt eini serlig evni, gávur og hegni til at verið saman við og at umgingist fólk, sum hevur viðført, at hon altíð hevur megna at skapt trivnað og góðar kenslur hjá menniskjum hon er saman við, og var tað hetta sum eyðkendi hennara grannalag inni í Brekkum, og tað var í hesum góðu umstøðum vit fingu loyvi til at vaksa upp í.

Mamma hevur altíð havt og hevur framvegis eina serliga umsorgan fyri okkum børnum, okkara familju og øðrum menniskjum. Hesa umsorgan vísti hon millum annað við at taka annan av synunum hjá Annu systur síni, ið doyði í barsilssong, til sín og uppaldi hann sum sín egna son, og vit gleddust um at hava fingið ein beiggja afturat.

Mamma hevur á ein serligan hátt merkt stórar og tyngjandi sorgir í lívinum, serliga tá vit hugsa um, at hon hevur misti tríggjar synir, ein sum nýføðing, ein í vanlukkuni á Toftavatni og ein í ferðsluóhappi í Toftatúni og til seinast pápa, men hennara tol, hennara lyndi og andaliga grundstøði hevur hjálpt henni ígjøgnum alt hetta á ein slíkan hátt, at vit børnini í dag hava eina mammu, sum uttan undantak er tann vit børnini leita til og fáa hjálp frá, tá vit eru blivin rakt av sorg og missi, og tað eru vit henni ómetaliga takksom fyri.

Nú mamma er 80 ár, kann hon av sonnum gleðast um børnini, svigarbørn, tey sjey ommubørnini og tey seks langommubørnini, og vilja vit við hesum ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum og ynskja tær Guds ríku signing í teimum komandi døgum og árum.

**Børnini við familju**

†

### Andlát og jarðarferðir

Jarðarferð Jóhannu Davidsen, vanliga nevnd Hanna, úr Sørvági, fer til gravar týsdagin 3. okt. kl. 14.00 úr Sørvágs kirkju. Bønarhald verður í Ellisheiminum í Vágum, í kvøld kl. 18.00. Tey, ið vilja minnast Hannu, kunnu lata Skandinaviskubarnamissionini eina peningagávu; konta í Føroya Sparikassa.

Alvilda Heinesen, Hósvík, andaðist leygarkvøldið á Korndalsbýlinum á Eiði 70 ára gomul. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14.00 úr kirkjuni í Hósvík. Tey, ið vilja minnast Alvildu, kunnu lata Korndalsbýlinum á Eiði eina peningagáu; konta í peningastovnium.

Kistan Páll á Dul fer frá kapellinum í dag kl. 18.00 heim í Betesda. Jarðarferðin verður frá Betesda týsdagin 3. okt. kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Páll, kunnu lata eina peningagávu til Malta í Hirtshals, konta í peningastovnunum.

Sosialurin

## Páll á Dul farin



Fríggjakvøldið 29. september andaðist Páll á Dul, Klaksvík, 90 ára gamal.

Seinastu árini hevur heilsan bilað honum, men nú hann hevur lagt frá landi til sína seinastu ferð, koma nógvir tankar og nógv minni fram fyri ein. Páll var ein heilt serligur persónur. Hóast lítil av vøkstri fylti hann nógv í sínum umhvørvi.

Hann varð føddur 25. apríl 1916 í Konradsbrekku í Havn. Foreldrini, Agnas hjá Konrad og Jógvan Jensen á Dul av Strondum, vóru flutt inn í húsini hjá Konrad. Tey fingu 9 børn, og var Páll nummar 6 í raðfylgjuni. Hesi 9 syskini, sum at byrja við øll itu Jensen, vóru: Dánjal, Signhild (g.Wolles), Hanna (g. Sundstein), Jógvan, Jákup, Páll, Grímur, Bjørga (g. Copland) og Mia (g. í Skorini). Tann elsti, Dánjal, varð føddur í 1906 og tann yngsta, Mia, varð fødd í 1922.

Men so kom sorgin til hetta hús. Í 1923 doyði húsfaðirin Jógvan. Agnas sat eftir við 9 faðirleysum børnum, tann elsti var 17 ár og tann yngsta 1 ára gomul. Tá var eingin almannaforsorg av nøkrum slag. Tað ráddi um at lívbjarga sær við arbeiðssemi og samanhaldi millum móðir og øll børnini, og ikki minst við trúðaráliti á Hann, sum hevði givið lyftið: »Faðir faðirleysra og verji einkjanna er Gud í heilaga bústaði Sínum«. Hetta orðið varð mangan havt á lofti í hesum heimi.

Syskini lærdu tíðliga at arbeiða, og øll, sum vóru so frægt til aldurs, gjørdu sítt fyri at skapa innløgu til húsið. Kúgv høvdu tey eisini og eina trøð, sum kommunan tó seinri tók frá teimum. Tað var helst nakað vit nú kundu rópt negativ almannaforsorg. Onkur góður persónur kom tó uppí og fekk útvegað ommu endurgjald. Agnas var læraralærd, men sjálvt um hon hevði maktað at arbeitt sum lærarinna, var hetta noktað henni av myndugleikunum, tí hon ikki var limur í fólkakirkjuni. Systir hennara Maria, fekk uppsøgn sum lærarinna av somu orsøk.

Eitt tíðarskeið legðist Agnas sjúk av tuberklum, nøkur av syskjunum vóru tá eftir í húsinum, meðan onnur fóru út til góð fólk at vera í eina tíð. Páll var tá eina tíð í Søldafirði.

Undir hesum umstøðum vaks Páll upp. Lítið var av heimsins góðsi, men so mikið meira var av menniskjansligum kærleika og samanhaldi. Trúfesti mótvegis hvørjum øðrum og gudsfrykt lærdu hesi fólkini, og saman hildu tey alt lívið. Við Pálli fór tann næstseinasti, nú er bert Mia eftir á lívi.

Arbeiðssemi og viljan til verka hevði Páll. Longu sum smádrongur byrjaði hann at arbeiða, og hann helt á til ellisaldur. Tá studentarskeið Løgtingsins varð stovnað meldaði hann seg til á fyrsta liðnum. Hann var sostatt við á fyrsta liði av føroyskum studentum. Áðrenn seinra heimsbardaga arbeiddi hann eisini eina tíð á Posthúsinum í Klaksvík og nakrar mánaðar hjá Kjølbro. Í Klaksvík hitti hann Alexandru Isaksen dóttir Sáru og Jens Klæmint. Tey vórðu trúlovað og í 1939 fór Páll til Danmarkar at lesa víðari. Tá fór Alexandra við. So brast kríggið á, og Danmark varð hersett. Tíðliga undir kríggnum giftust tey og fyrsta barnið, Sára, varð fødd í Keypmannahavn.

At byrja við las Páll á Handilsháskúlanum og tók HA prógv. Seinri fór hann at lesa jura og tók juridiskt prógv í 1948. Men tá var ikki sum nú SU og onnur fíggjarlig hjálp. Alla sína tíð í København arbeiddi hann ymiska staðni. Undir kríggnum var familjan sum sagt innilæst í Danmark, men hugurin til at koma heim aftur var alla tíðina til staðar. Beint aftaná kríggið, tá fyrstu føroysku sluppirnar fóru niður og komu aftur, royndi Páll at sleppa heim við. Tað eydnaðist honum at koma heim í juni 1945 við sluppini Mjóanes. Tað stendur enn so livandi fyri mær, hvussu spent vit børn vóru at síggja skyldfólkini, sum vit í veruleikanum ikki kendu, tí skilnaðurin hevði verið so langur. Eg hevði tveir mammubeiggjar, Jógvan og Páll, og tveir pápabeiggjar, Dánjal Jakku og Eilef, í Danmark undir kríggnum. Eg var smádrongur tá heimsbardagin byrjaði, og stórur drongur, tá hann endaði. Tað vóru spennandi kenslur at síggja hesar skyldmenn aftur.

Páll og Alexandra fluttu heimaftur til Føroya um leið 1949. Ætlanin hjá honum var helst at byrja hjá einum advokati í Havn. Men lagnan vildi tað øðrvísi. Jógvan Kjølbro kendi Páll frá tíðini í Klaksvík í tríatiárunum, og tá Poul Als fór aftur til Danmarkar, bað Kjølbro Páll um at gerast skrivstovuleiðari í Kjølbro fyritøkuni. Her kom sostatt stórur partur av hansara lívsstarvi at vera. Tey búsettust í Klaksvík, og í Klaksvík andaðist hann nú, gamal og mettur av døgum.

Í Klakvík fingu tey eisini tey bæði næstu børnini Agnar og Maritu. Av børnunum hjá Páll býr Agnar, giftur við Evy, í Klaksvík, Sára, gift við Sverra Hentze, býr í Liseleje og Marita, gift við Jón Nystrøm, býr í Hirtshals.

Aftaná at vera givin í Kjølbro fyritøkuna hevði Pálla fleiri onnur størv, arbeiddi fyri ein part tað, sum nú verður rópt free lance. Men hann fekk inn í millum eisini tíð til at royna tað politiska lívið. Hann sat, so vítt eg minnist, tvær setur í Klaksvíkar býráð, og var eisini eitt skifti borgarstjóri.

Men har, sum hansara allar størsta trúfesti hevur víst seg, er í samkomuni í Betesda. Tað sum hann lærdi og varð uppdrigin við heima hjá mammuni í Konradsbrekku, bar frukt, og virkaði líka til tann dag, hann ikki slapp at vera nærverandi longur. Hansara tænasta í samkomuni, og Alexandrusa og hansara gestablídni mótvegis fremmandum og ikki minst trúboðarum, kann ikki virðismetast.

Páll var ein positivur maður. Ein lívsglaður persónur, sum man gjørdist glaður av at vera saman við. Eisini ein stuttligur persónur. Hann var skemtandi, men hann vitsti eisini, at álvara og skemt bert eru tvær síður av somu søk.

Lydia og eg hava nógv at takka Pálli fyri. Vinarlag hansara og blíðskap hava vit notið mangan. Eitt eyðkenni fyri hann var, at hann ongatíð gloymdi okkum. Hvørt einasta ár, tá eg hevði føðingardag ringdi Páll at ynskja til lukku. Líka til hann ikki kundi longur.

Takk fyri alt og hvíl í friði, góði skyldmaður.

**Jógvan Sundstein**